# Drukna í samanberingini

**Neistin-Kyndil hjá kvinnum og KÍF-H71 hjá monnum tykjast fullkomuliga týdningarleysir, sammett við tey bæði brakini, sum verða á skránni leygar- og sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Einki er at ivast í, hvørjir stórdystirnir í hondbóltskappingini eru hetta vikuskiftið.

Sum tað ivaleyst eisini framgongur her á síðunum, so er tað í Vági leygardagin og í Havn sunnudagin, at stóru dystirnir eru á skránni, men tað eru so eisini tveir aðrir dystir, sum skulu leikast.

Kvinnuliðini hjá Neistanum og Kyndli hava æruna av at hita upp til mansdystin, men tað er tó langt ífrá, at hesin dysturin hevur sama týdning á stigatalvuni, sum tann hjá monnunum.

Hvussu víkir og vendir, so verður tað helst so, at Neistin endar á fjórða- og Kyndil á niðasta plássinum í kvinnudeildini, og tí tykist eingin ivi vera um, hvat av liðunum fer við stigunum hesaferð. Kyndil hevur tó argað Neistan onkra aðratíð, og so er spurningurin, hvørt tær eisini megna tað hesaferð.

Hjá monnunum verður dystur í Hoyvík kl. 16.00, tá flestu eygu annars munnu vera vend móti høllini á Hálsi. KÍF og H71 hava alt kappingarárið stríðst um at sleppa undan botnsessinum, og við sigri á StÍF slapp H71 sær fyri eina løtu av hesum.

Og líka mikið, hvussu víkir og vendir, so eru hoyvíkingar kanska eisini meira motiveraðir enn kollfirðingarnir í løtuni. Higartil hevur tað hjá H71 mest verið so, at teir hava spilt spæli hjá Kyndli, men í seinasta umfarinum kann væl vera, at tað verður H71, sum skal hava ein fingur við í spælinum, tá Neistin vitjar í Hoyvík.

Undan hesum er tað tó KÍF, sum vitjar, og skulu hoyvíkingarnir tryggja sær, at teir ikki verða niðastir, so skal hesin dysturin kasta tvey stig av sær. Tað sama er tó galdandi fyri kollfirðingarnar, so æran stendur í øllum førum upp á spæl hjá báðum pørtum.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
**1. deild kvinnur**

| Dagf. | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 27.03 | 15.00 | VB-Stjørnan | Kristian Johansen & Sámal Hansen |
| 28.03 | 14.30 | Neistin-Kyndil | Karsten Joensen & Kristian Joensen |

**1. deild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 28.03 | 16.00 | Neistin-Kyndil | Karsten Joensen & Kristian Joensen |
| 28.03 | 16.00 | KÍF-H71 | Geir Wardum & Gunnar Gregoriussen |

**Fótbóltur**
**Kappingin um løgmanssteypið**
**Bólkur 1**

| Dagf. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 27.03 | KÍ-NSÍ | Suni Johansen |
| 27.03 | B36-FSV | Petur Skarðenni |

**Bólkur 2**

| | | |
|---|---|---|
| 27.03 | TB-B68 | Dagfinn Olsen |
| 27.03 | ÍF-GÍ | Birgir Sondum |

**Bólkur 3**

| | | |
|---|---|---|
| 27.03 | Skála-HB | Páll Augustinussen |
| 27.03 | EB/S-B | Eiler Rasmussen |

# Skulu aftur á aldukambin

**Hondbólturin hevur fylt nógv hesar seinastu dagarnar. Tað viðgongur Hans Áki Dal Christiansen, sum við spenningi sær fram til sunnudagin, tá Kyndil skal takast við grannarnar úr Neistanum í størsta dystinum higartil í ár**

ODDABRAK
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Stjórin og onkur afturat eru neistamenn og hesar seinastu vikurnar er man farin at hoyra alt meira til teir, sigur Hans Áki Dal Christiansen, sum tó ikki tykist hava nakrar trupulleikar av hesum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tá vit trína inn í handilin við Smyrilsvegin, tykist einki soleiðis óvanligt vera áfatt. Nøkur andlit heilsa, meðan onnur bara fara framvið, og sum so tykist hetta lítið hava eina upptaksgrein her í blaðnum at gera.

Men inni á verkstaðnum er tó ein, sum hevur nakað við hondbólt at gera. Tað er nevnliga her, at liðskiparin hjá Kyndli, Hans Áki Dal Christiansen heldur til, og hann er skjótur at viðganga, at tað hevur verið nógv hondbóltstos á skránni hesa seinastu vikuna.

– Tað hevur kanska verið í meira lagi, um eg kann siga tað so. Fleiri eru her, sum halda við Kyndli, men stjórin og onkrir afturat eru tó neistamenn, og hesar seinastu vikurnar er man farin at hoyra alt meira til teir, sigur hann við einum smíli.

### Hava nortið botnin

Og at hesir eru vorðnir meira ljóðligir, hongur helst eisini saman við vána gongdini, sum Kyndil hevur havt seinastu tíðina. Ein gongd, sum í øllum førum hevur gjørt kappingina um meistaraheitið óvanliga spennandi, tí uttan niðurtúrin, sum Kyndil hevur haft, so var gullið helst langt síðani avgjørt, og sum so tykist Hans Áki eisini at harmast eitt sindur um hetta.

– Øll lið hava sínar uppog niðurtúrar, men tað er eingin loyna, at hjá okkum kom niðurtúrurin júst tá, ið hann ikki skuldi koma. Tað hevur sett eitt stórt trýst á, men hinvegin haldi eg sjálvur, at vit hava verið heilt niðri á botni og vent, og nú eru vit so á rættari kós, sigur hann avgjørdur.

Spurdur, júst hvat tað var, ið gekk galið hjá Kyndli, sigur hann, at tað er trupult at peika á nakra einstaka orsøk.

– Tað eru helst fleiri orsøkir. Eg skal so avgjørt ikki tosa ringt um Jan, men hesa seinastu tíðina hava vit fingið økt intensitetin í venjingunum. Tað er jú gjarna soleiðis, at innsatsurin undir venjing sæst aftur í dystunum, og í so máta hava hesar seinastu vikurnar givið góð tekin.

### Skulu á toppin

Og hóast lítla niðurtúrin, so er tað jú framvegis soleiðis, at teir í Kyndli framvegis kunnu avgera alt sjálvir. Tað »einasta«, sum krevst, eru fýra stig í teimum báðum seinastu dystunum, og Hans Áki dylir ikki fyri, at leikararnir síggja fram til hetta. Ella rættari - til dystin sunnudagin.

– Hetta er kanska størsti dysturin á árinum, so vónandi megna vit eisini at veksa við uppgávuni. Og vit hava so sanniliga nakað at hevna eftir umgangin, sum Neistin gav okkum í fyrra dystinum í endaspælinum.

Og eru tað so nøkur serlig ting, sum tit leggja dentin á hesaferð?

– Tað er tað sjálvandi. Fyrst og fremst, so hevur Neistin nakrar stórar skjúttar, sum vit mugu fáa fatur á. Gera vit ikki tað, so verður tað ógvuliga trupult.

– Men yvirhøvur, so hava teir eitt gott lið, og vit mugu sjálvir vera á toppinum, um vit skulu vinna dystin. Verjan skal rigga til fulnar, og álopsspælið skal so sjálvandi eisini koyra. Gongur alt upp í eina hægri eind, so ivist eg ikki í, at vit kunnu taka teir, staðfestir hann.

Og gera tit tað, so er klárt til finaludyst móti VÍF?

– So langt eru vit als ikki komnir. Dysturin móti VÍF er ikki fyrr enn í næstu viku, so hann hugsa vit ikki um enn, sigur avgjørdur leikari.

### Onkur ivamál

Hjá Kyndli eru onkur ivamál til dystin. Hans Arni Thomsen, sum veruliga hevur trokað seg framat besta liðnum, hevur skaða í einum fingri, og Finnur Hansson stríðist framvegis við skaðan í økslini, sum hevur darvað stóran part av grundspælinum.

Aðrir leikarar dragast eisini við smærri snuddir, men sum Hans Áki sigur, so eru hesir neyvan av slíkum slag, at teir halda monnunum frá dystinum nú sunnudagin.

Og skuldi tað borið soleiðis á, so eru somu menn helst eisini til reiðar til eitt seinsta brak um eina viku.

Men fyrst og fremst, so snýr tað seg um Neistan. Tann dysturin er ein, sum skal vinnast, skal Kyndil gera sær nakrar vónir yvirhøvur um at gerast føroyameistarar.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 10 | 9 - 0 - 1 | 604 | 434 | 170 | 29 |
| 2 VB | 10 | 10 - 0 - 0 | 632 | 457 | 175 | 28 |
| 3 VÍF | 10 | 6 - 0 - 4 | 576 | 477 | 99 | 21 |
| 4 Neistin | 10 | 5 - 0 - 5 | 553 | 522 | 31 | 18 |
| 5 StÍF | 11 | 2 - 0 - 9 | 524 | 642 | -118 | 9 |
| 6 Søljan | 11 | 3 - 0 - 8 | 437 | 563 | -126 | 8 |
| 7 Kyndil | 10 | 1 - 0 - 9 | 359 | 590 | -231 | 3 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 8 | 6 - 0 - 2 | 516 | 477 | 39 | 18 |
| 2 Kyndil | 8 | 4 - 1 - 3 | 538 | 503 | 35 | 18 |
| 3 VÍF | 8 | 5 - 0 - 3 | 511 | 461 | 50 | 16 |
| 4 StÍF | 8 | 3 - 0 - 5 | 470 | 452 | 18 | 13 |
| 5 H71 | 8 | 3 - 1 - 4 | 453 | 515 | -62 | 9 |
| 6 KÍF | 8 | 2 - 0 - 6 | 489 | 569 | -80 | 7 |

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

**Bólkur 1**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 KÍ | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 2 B36 | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 3 NSÍ | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 4 FSV | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |

**Bólkur 2**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 5 | 2 | 3 | 3 |
| 2 GÍ | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 3 TB | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 4 B68 | 1 | 0 - 0 - 1 | 2 | 5 | -3 | 0 |

**Bólkur 3**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 2 HB | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 3 EB/S | 1 | 0 - 0 - 1 | 2 | 3 | -1 | 0 |
| 4 Skála | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |

# Vit skulu avgerða tað sjálvir

**Karl Oddmar Rasmussen er ein av royndastu leikarunum á Neistaliðnum, sum sunnudagin skal leika ein ógvuliga týðandi dyst móti grannunum úr Kyndil**

ODDABRAK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Millum týdningarmestu uppgávurnar hjá Karl Oddmari verður helst at ansa eftir, at Kyndils-álopini ikki koyra ov skjótt*
*mynd: Álvur Haraldsen*

Spenningurin er stórur í Havn undan hondbóltsdystinum millum bestu mansliðini hjá havnarfeløgunum báðum, Neistanum og Kyndil, ið verður í høllini á Hálsi sunnudagin. At fólk eru spent til dystin, er eisini nakað, ið leikararnir merkja til dagligt.

### Alt liggur í okkara hondum

Kyndil og Neistin liggja jøvn í stigum á ovastu rók í føroysku hondbóltskappingini, og nú farið verður undir næstseinasta umfar, er spenningurin sjálvsagt øgiliga stórur. Karl Oddmar Rasmussen sigur, at hann merkir væl, hvussu spent fólk eru, bæði úti í býnum, men eisini á arbeiðsplássinum, politistøðini í Havn.

Karl Oddmar sigur, at teir í Neistanum í løtuni bara hugsa um tann komandi dystin, og ikki um FM-heitið, sum verður endaliga avgjørt næsta vikuskifti. Alt liggur í okkara hondum, sigur Karl Oddmar Rasmussen, tí um vit vinna báðar teir seinastu dystirnar hjá okkum, eru vit føroyameistarar, so einkult er tað, sigur hann. At hondbóltskappingin er óvanliga spennandi í ár, er neyvan nakað dulsmál, og Karl Oddmar Rasmussen heldur, at tað má verða sera gott og undirhaldandi fyri áskoðararnar, at tað er so stórur spenningur í kappingini.

### Fyrireika seg sum vanligt

Í Neistanum hava teir ikki nakrar ætlanir um at gera nakað eyka burtur úr fyrireikingunum til dystin sunnudagin. Karl Oddmar sigur, at teir hava púra vanligar venjingar upp undir dystin, og til síðstu venjingina undan dystinum brúka teir ein tíma upp á serligar verju- og álopsstøður, ið skulu nýtast undir komandi dystinum.

Tá ið talan er um rættuliga avgerðandi dystir, plaga teir á besta mansliðnum hjá Neistanum eisini at hittast dagin fyri dystin, har teir í felag hyggja at einum sjónbandi av seinasta dystinum móti mótstøðuliðnum, og soleiðis verður tað allarhelst eisini hesaferð, sigur Karl Oddmar. Á sjálvum leikdegnum hevur liðið taktikfund, men annars er tað upp til hvønn einstakan leikara á sín egna hátt at seta seg upp til dystin, ið liggur fyri framman, sigur Karl Oddmar Rasmussen.

### Bróta rútmuna hjá Kyndil

Skal Neistin basa Kyndil sunnudagin, er tað neyðugt hjá teimum at bróta rútmuna hjá teimum grønu, sigur Karl Oddmar Rasmussen. Hann heldur tað verða sera umráðandi, at Kyndil ikki fær loyvi til at spæla sítt kvika spæl, tí so eru teir sera vandamiklir, sigur hann. Karl Oddmar sigur eisini, at tað er púra vist, at Kyndilsmenn noyðast at berjast fyri hvørjum einasta máli, ið teir fáa í dystinum, tí teir fór einki í gávu frá Neistanum. Hinvegin heldur Karl Oddmar ikki, at oddsini eru góð hjá Neistanum, tí eftir hansara tykki hevur Neistin ikki spælt tveir góðar dystir á ráð alt kappingarárið, og seinasta vikuskifti spældi Neistin væl móti vestmenningum, og tí verður spennandi at síggja, um teir megna at spæla enn ein góðan dyst sunnudagin. Karl Oddmar Rasmussen sigur eisini, at dagsformurin kemur at hava sera stóran týdning, men vit eru kanska omaná sálarliga, av tí at vit seinast vunnu á teimum við tíggju málum.

Karl Oddmar Rasmussen, ið væntar fulla høll sunnudagin, sigur eisini, at óansæð hvør vinnur sunnudagin, so er einki avgjørt undan seinasta leikumfari. Vinnur Neistin, skulu teir eisini basa hoyvíkingum fyri at vinna FM, meðan vinnur Kyndil, skulu teir basa vestmenningum, sum tá eisini kunnu gerast føroyameistarar við at vinna á Kyndil, um teir altso hava bast strandingum frammanundan. Karmarnir verða óivað í topp, sigur Karl Oddmar, sum vónar, at áskoðararnir hjá Neistanum fara at verða eins góðir sunnudagin, sum teir vóru í Vestmanna seinasta vikuskifti.

# Spenningurin er tann sami

**Eyðbritt Krosslá hevur nokk roynt tað, sum er vert at royna í føroyskum kvinnuhondbólti. Hetta tykist tó ikki merkja hana tað minsta pettið, nú VB riggar til gullbrakið leygardagin. Spenningurin til hetta er í øllum førum enn tann sami**

GULLDYSTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í Vági er spenningurin sum vera man ovurstórur, nú gullbrakið í FM-stríðnum stendur fyri framman.

Roknað verður við, at fullsett høll fer at hyggja at, tá dómarararnir blása dystin ígongd, og tað er einki at ivast í, at talan verður um ein heitan dyst. Fáa staðni í landinum munnu lið kenna seg á útivølli á sama hátt, sum tey gera tað í Vági, og tað er heldur einki at ivast í, at leikararnir leggja stóran dent á tann stuðulin, sum tær við hesum fáa.

Ein av teimum, sum framvegis er partur av liðnum hjá VB, er Eyðbritt Krosslá. Eitt sindur óviljað, kundi kanska verið skoytt afturat, tí upprunaliga hevði hon als ikki ætlað sær at spælt á besta liðnum í ár.

Eitt nú segði hon eftir steypafinaluna í fjør, at um hon nú eisini gjørdist føroyameistari, so fór hon at gevast, men kortini valdi hon so at taka eina hond við, tá mest stóð á hjá VB.

– Tað var nokk fyrst og fremst útlendingamálið. Tað hevði við sær, at vit einki fólk høvdu eina løtu, og so noyddist eg at taka eina hond við.

– At tað so hevur gingist somikið væl hjá liðnum, ger tað sjálvandi bara enn stuttligari. Eitt er at blíva føroyameistarar, men høvdu vit klárað at endurvunnið gullið, so vildi tað í mínum hugaheimi verið enn størri.



*Hóast hon ætlaði at gevast eftir dupulta gullið í fjør, so hevur Eyðbritt játtað at taka enn eitt tørn hjá VB, og nú er so møguleikin fyri, at eisini hetta kann kasta gull av sær*

### Sami spenningur

Og hóast hon í øllum førum er tann leikarin hjá VB, sum hevur nógv tær flestu royndirnar, so heldur hon ikki, at spenningurin broytist nakað fyri tað.

– Tann parturin broytist ikki, og sum so fær hann kanska heldur ikki loyvi til tað. Líka mikið hvar man vendir sær, so tosa fólk í bygdini um dystin leygardagin. Seinastu dagarnar hevur mest sum ikki verið prátað um annað, so tað sigur seg sjálvt, at tú eisini sjálv verður gripin av hesum, heldur hon.

Soleiðis er líkt til, at talan verður væl og virðiliga um fult hús, og skal metast eftir undanfarnu dystunum, so hava áskoðararnir eisini ein góðan og spennandi dyst í væntu.

Í grundspælinum vann Stjørnan báðar dystirnar móti VB, tó at tað í Vági stóð sera nógv á. Fyrra dystin í endaspælinum vann VB tó trygt í Klaksvík, men bara vikuna eftir tók Stjørnan ein tepran eittmáls sigur í steypfinaluni, so tað tykist á pappírinum, sum um alt er púrasta opið.

Tað heldur Eyðbritt eisini sjálv, at tað er, men hon leggur tó dent á, at tær sjálvar eiga avgerðina.

– Teir báðar dystirnar í vár haldi eg greitt hava sýnt, at vit kunnu vinna dystin. Í Klaksvík vunnu vit jú við sjey málum, og fyrstu løtuna av steypafinaluni bendi alt á tað sama.

– Akkurát hvat hendi tá, skalt tú ikki spyrja meg um, men vit fóru í hvussu er niður við høvdinum. Samstundis hildu vit uppat við at spæla sum eitt lið, og tað var kanska størsta forðingin. Dystin í Klaksvík megnaðu allar á liðnum at taka ábyrgd, og bæði í álopi og verju megnaðu vit at standa saman. Tað eru fyrst og fremst hesir eginleikarnir, sum vit nú skulu finna fram, og gera vit tað, so eri eg ikki í iva um, at vit vinna dystin. Eisinin hóast eg havi stóra virðing fyri Stjørnuni.

Og at enda sníkir seg so spurningurin, sum mátti koma. Verður leygardagurin næst-seinastu ferð, at vit fara at síggja Eyðbritt á vølli í bestu kvinnudeildini, ella verður hon kanska aftur lokkað til enn eitt tørn næsta ár?

– Nú haldi eg, at tað er liðugt. Tað má tað for ólukkan vera, sigur hon flennandi, áðrenn hon aftur fer at taka sær av børnunum, sum alla samrøðuna hava verið at hoyrt í bakgrundini.